## Føroysk uppgerð í Danmark

Sunnudagin spældu Fremad Amager og Frem ímóti hvørjum øðrum í donsku 1. deild, og í hesum báðum feløgum eru fýra føroyskir spælarar at finna. Tveir teirra spældu við í hesum dystinum. Andrew av Fløtum spældi allan dystin fyri Fremad Amager, og Jónas Tór Næss spældi somuleiðis allar 90 minuttirnar fyri Frem.

Úrslitið av dystinum var, at Frem vann 1-0. Martin Jeppesen skoraði málið hjá Frem eftir eitt korter. Andrew av Fløtum hevði ein góðan møguleika at javna móti endanum av dystinum, men hann fekk ikki bóltin framvið fyrrverandi Liverpool-málverjanum Jørgen Nielsen, sum vardi málið hjá Frem.

Hetta var ein góður – og kanska nakað óvæntaður – sigur hjá Frem, sum hevur mist fleiri spælarar í vetur.



*Andrew av Fløtum mátti lúta fyri Jónas Tór Næss og teimum í Frem*
*Mynd: Fremad Amager*

## Christian Holst aftur á vøllinum

Christian Holst Lamhauge, sum spælir fyri danska felagið Lyngby, var aftur á vøllinum um vikuskiftið, eftir at hann hevur verið plágaður av skaða í fleiri vikur. Hann spældi við í venjingardysti ímóti Næstved, sum Lyngby vann 1-0. Christian spældi í álopinum frá byrjan og spældi í ein hálvleik, áðrenn hann varð skiftur út.

*NSÍ*

*KÍ*

# KÍ hevur funnið stríðsviljan aftur

**Heimaliðið misnýtti avgerandi brotsspark, og NSÍ verjan var ikki so tøtt, sum tað hevur verið arbeitt fram ímóti, at hon skal vera**

NSÍ-KÍ
*Jóannes Hansen*



*Harley Bertholdsen hevði gott tak á NSÌ-spælarunum*

KÍ hevur endurvunnið og endurfunnið stríðsviljan, sum ofta hevur verið avgerandi í Klaksvík, og sum tað hevur verið so eiðasørt við tey seinastu árini. Rættari er at venda tí tann vegin, at Tony Paris hevur pískað hugburðin í aftur klaksvíkingarnar, sum teir sjálvir hava roynt at leita eftir, men sum teir ikki hava funnið. Serliga hesin veruleikin var orsøkin til, at úrtøkan í Runavík sunnudagin var so stór, sum tað ber til.

Tað var ikki so vakurt í 1. hálvleiki, men KÍ megnaði at halda tætt, og sum 2. hálvleikur leið, vóru tað gestirnir úr Klaksvík, sum við Løkin í Runavík vóru leikliga omaná. Tað sást væl, at tað var tíðliga á árinum. Talan var á ongan hátt um poleráð samanspæl, men teir bláu funnu eftir steðgin betri hvønn annan, enn heimamenninir gjørdu tað. Og um sæð verður burtur frá brotssparkinum, sum dómarin metti, at Meinhardt Joensen uttarlaga í brotsteiginum hevði gjørt móti Christian Høgna Jacobsen, tá ið lítið korter var farið, so átti KÍ teir mest uppløgdu málmøguleikarnar.

Ovi Nysted var heilt leysur í vinstru eftir fríspæling frá Paul Clapson, men Jens Martin Knudsen hálvbjargaði í handaru síðu, og løtu seinni var tað Paul Clapson, sum var leysur, men Jens Martin vísti aftur, at hann framvegis er væl fyri. Eftir dystarlok vóru misnýttu málmøguleikarnir gloymdir, og Ovi Nysted og Meinhardt Joensen vóru stóru hetjurnar í KÍ hópinum, sum saman við venjaranum í felagsskapinum – ein fyri allar og allir fyri ein – gav til kennar, at hetta skal vera tað, ið fer at bera stig og plaseringar við sær.

### KÍ betri við

NSÍ hevði betri tak á fyrra partin av 1. hálvleiki. Fyrstu løtuna gekk væl hjá sentralu og ungu monnunum, Boga Løkin og Jóhan Troest Davidsen, sum mannaðu sentrala miðvøllin saman við Dánial Hansen. Serliga í vinstra borði komu Sjúrður Jacobsen og upp á skift teir tríggir í fremstu røð til tvørbóltar. Men NSÍ hevði lítla og onga tyngd og ongan brodd í brotsteiginum, har Atli Danielsen var tryggur aftasti skansi hjá klaksvíkingum.

Sum fyrra umfarið leið, lynkaði NSÍ trýsti, og tá ið spælararnir eftir hvíldina komu út aftur í góðu vársólina, var KÍ uppaftur betri við. Í útgangsstøðuni tóktist uppstillingin at vera 3-5-2, men ágrýtni Høgni Madsen røkti meiri og meiri miðverjuuppgávu saman við Atla Danielsen. Hjalgrím Elttør og Símun Joensen vístu alla tíðina stór arbeiðsevni á sentrala miðvøllinum, og sum seinna umfarið leið, vóru tað klaksvíkingar, sum vístu størri tyngd og saft og kraft í nógvu nærdystunum.

Sjúrður Jacobsen hevði tríggjar góðar langskotsroyndir, sum tó fóru framvið málinum, og eftir innlegg úr vinstru royndi Helgi L. Petersen við stútara, sum fór framvið.

### Ovi gjørdi sigursmálið

NSÍ venjarin skifti, sum 2. hálvleikur leið, fleiri ferðir út í vón um at fáa størri tyngd í álopspartin, men nú vóru tað klaksvíkingarnir, sum vóru tendraðir. Í verjupartinum megnaðu teir oftast at traðka fram um mannin, sum bólturin hevði kós ímóti, og tá ið teir ikki megnaðu tað, so var tað heilt skjótt, at heimamaðurin var kringsettur av tveimum ella trimum bláum. Ikki minst veteranarnir í verjuni, Harley Bertholdsen, sum datt alt longri aftur í høgru, og Marek Wierzbicki og Iulian Florescu, sum vóru sannir meistarar í at lesa spælið, stóðu seg væl frammanfyri Meinhardt Joensen, ið var tryggur á strikuni og í brotsteiginum, men sum ov ofta skundaði sær ov nógv við útspælinum, sum tískil gjørdist óneyvt.

Tað lá í luftini, at eitt mál fór at koma. Og tað var KÍ, sum fekk málið, tá ið lítið korter var eftir. Eftir innlegg úr høgru og nærdyst við miðverjarnar eydnaðist tað Ova Nysted at gerast leysur, og hann potaði bóltin framvið Jens Martini Knudsen.

NSÍ slepti í verjupartinum, men KÍ átti størstu møguleikarnar. Paul Clapson sendi úr høgru og í nærra stólpan, og innskifti Steffan Kalsø sendi úr góðari støðu eitt vet til vinstru í brotsteiginum og dygst omanfyri handaru samankomingina.

## Av beinkinum og til bjargingarmann

Meinhardt Joensen í KÍ málinum bjargaði brotssparkinum frá Christian Høgna. Um alt hevði verið, sum tað skuldi, so hevði Meinhardt sitið á beinkinum.

– Ætlanin var, at Paul Clapson skuldi verja málið. Tá ið vit møttu til venjingar fríggjakvøldið, fekk eg at vita, at eg skuldi verja málið. Tað kom óvart á meg. Frágreiðingin var, at Paul hóskvøldið undir venjing var skaddur í einum fingri. Tí var hann í álopinum og ikki í málinum, greiðir KÍ málverjin frá.

Lúrdi tú hann av?

– Eg var orsøkin til brotssparkið. Tá ið dómarin hevði bríkslað fryktaði eg fyri reyða kortinum. Tað kom ikki, og tað var rættur dómur. Eg fekk beinanvegin góða kenslu um, at eg fór at bjarga. Tá hugsaði eg ikki um, at eg í 3-2 hevði sæð Christian Høgna skjóta tvey brotsspørk í Sørvági. Eg fekk beinanvegin fatan av, at hann fór at skjóta til vinstru fyri seg sjálvan. Eg fintaði eitt sindur, og tíbetur var eg heppin, staðfestir KÍ málverjin, sum rósar sínum liðfeløgum fyri góða skipan og stóran stríðsvilja.

– Eftir brotssparkið vendi tað okkum til fyrimunar. Vit vórðu sinniliga lyftir upp, og teir tóktust tyngdir.

### Fleiri nýggir

16 ára gamli Steffan Kalsø umboðaði fyri fyrstu ferð KÍ í FORMULA DEILDINI, tá ið hann varð settur á vøllin fyri veteranin og einasta málskjúttan – Ova Nysted. Hetta var eisini fyrsti landskappingardysturin hjá Paul Clapson.

Á NSÍ liðnum var Jóhan Troest Davidsen fyri fyrstu ferð við frá dystarbyrjan í FORMULA DEILDINI, og Bogi Løkin hevði størri leiklut, enn hann áður hevur havt á besta NSÍ liðnum.

**Annars haldi eg**

***Marek er 42 ára gamal, men hann spældi betur enn alt (K)ÍF-liðið í Havn – Jákup Ósá, Klaksvík***